


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Víðkaðar heimildir hjá maskinmonnum


RODMUND NIELSEN
Fólkaflokkurin

Skúla- og útbúgvingarskipanirnar í Føroyum hava í stóran mun havt støði í donskum skipanum. Soleiðis er eisini við yrkisútbúgvingarskipanini. Lagið hevur mangan verið, at dagføringar av skúlaskipanum í Føroyum eru gjørdar langt aftaná, at samsvarandi danskar skipanir eru broyttar. Heldur ikki her er yrkisútbúgvingar-skipanin nakað undantak.

Soleiðis er eisini við maskinmeistaraútbúgvingini. Vit hava ein hóp av maskinmeistarum við drúgvum royndum íð ikki hava heimildir samsvarandi teimum í grannalondum okkara. Her er tørvur á kunngerðum, so at hesir dugnaligu hendur kunnu fáa seg royndar á sama støði sum í grannalondum.

Maskinmeistaraútbúgvin íð varð, hevði víðari heimildir enn loyvt er í dag. Ein skiftisskipan eigur at verða loyvd, so at okkara dugnarligu maskinmenn hava sama møguleika sum teir í grannalondum okkara sum í ávísan mun eisini eru fevndir av skiftisskipanum.

Lat okkum vísa okkara siglandi fólki, at møguleikar við føroyskum prógvum eru minst líka góðir sum í grannalondum okkara - helst betur. Sum flest vita, er frálandavinnan munandi ment síðstu árini og skulu vit dúva uppá okkara egnu maskinfólk og yvirmenn – so skulu tey eisini hava somu møguleikar sum tey í grannalondum okkara sum eru fevnd av skiftisskipanum í ávísan mun.

# Ingeborg Vinther forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, Javnaðarflokkurin og Heðin Mortensen


HØGNI MIKKELSEN
Sambandsflokkurin

Ingeborg Vinther spyr um javnaðarflokkurin vil leggja navn til politikkin hjá Heðin Mortensen.

Eg veit eitt sindur um byggimálið ið skrivað verður um í dimmalætting tann 14. januar, og eg taki fult undir við greinini sum Ingeborg skrivar.

Tað verða nógv frávik givin til byggiloyvir í kommununi.

Býráðið hevur broytt byggisamtyktina fyri at kommunan sjálv kann byggja ávísar byggningar, og tí dugi eg ikki at skilja, hví kommunan hevur so nógv ímóti at Føroya Arbeiðafelag byggir tvær ognir saman á stóra grundøkinum, sum felagið eigur við Stoffalág 17.

Eitt kann eg siga tær Ingeborg , eg haldi at Heðin Mortensen kundi líka so gott verið limur í Tjóðveldinum, Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum. Miðflokkinum ella Miðnámsflokkinum. Tað sum er fremst í huganum hjá Heðin Mortensen er, hvar hann sjálvur kann fáa mest burturúr, tað sóu vit tá sitandi samgonga í býráðnum varð skipað.

Lat Javnaðarflokkin eiga handan politiska orðloysingin, eg rokni ikki við at aðrir flokkar vilja hava hann.

# Val og valstríð


SIGMUND ANDREASEN
Miðflokkurin

Eftir at eg havi verið við til nakrar valfundir, og upplivað stríðið frá einum øðrum vinkli enn áður, eg vóni ikki veljarin letur seg lumpa av tí sirkusi, sum vit uppliva, tveir av okkara størstu flokkum koyra runt um oyggjarnar og billa fólki inn, at bert teir kunnu stýra Føroya landi.

Eg havi skilt, hvussu gott og umráðandi tað er, at koma inn á ting at sita, tað rokni eg við, at øll í Føroyum síggja. Á valfundum sum eg havi verið á, eru nógv boð uppá hvat skal gerast, skúlar, ellisheim, orkusparingar, tunnlar, flogvøllir, og mangt mangt annað, alt hetta kostar nógvan pening, blokkurin skal eisini skerast niður til onki, væl duga teir at framføra seg, og at raðfesta, hvussu alt Føroyar skal útbyggjast, tað verður lítið tosað um, hvar peningurin skal koma frá, men tað hevur kanska ongan týdning, tað sum umrøður nú, er at fáa tína stemmu og koma inn um tingsins gátt, so verður friður í trý ár, og so endurtekur tað seg, alt tað sum vit nú uppliva, eg havi roynt at vísa á nógvar skeivleikar, serliga við okkara fiskivinnu, sum eg meti, er tað hon sum skal gera at vit í Føroyum kunnu klára okkum sum tjóð, nú leygardagin kemur so avgerðin, mín vón er at føroyingurin ikki letur seg ávirka av førda sirkus-spæli, um hesir hava gjørt so nógv gott fyri okkum, so skuldi ikki verið neyðugt at farið út og billa føroyinginum nakað inn, sum onki hevur við veruleikan at gera.

Tú sum veljari kann broyta gongdini við tíni stemmu. Eg vóni eftir valið at síggja nýtt fólk mannað okkara ting. Í Miðflokkinum eru vit nógvir góðir mans og kvinnur, sum saktans kunnu taka okkum av hesi uppgávu.

Gott val.

# Flex-farloyvi við barnsburð


BJØRT SAMULESEN
Tjóðveldi

Nú flestu flokkar lova at leingja barnsburðarfarloyvið uppí eitt ár, skuldi tað so gott sum verið í pottinum. Men, tá nýggja løgtingið fer at broyta lógina um barnburðarfarloyvi, er tað sera umráðandi, at vit gera skipanina flexibla, so foreldur sjálvi kunnu velja, hvussu tey vilja leggja farloyvið við løn til rættis.

Skipanin eigur at verða broytt soleiðis, at foreldrini kunnu leggja sær barnsburðarfarloyvið til rættis við parttíð yvir longri tíðarskeið – ynskja tey og hóvar tað teimum best.

Flex-farloyvi vil eg fyribils kalla hugtakið, sum er við í okkara valkrá. (Heiti á orðasmið at finna eitt gott føroyskt orð)

# Tórshavn vitin og varðin


POUL MICHELSEN
Fólkaflokkurin

Lokal áhugamál hava alt ov leingi forðað fyri einum neyðugum kjaki um, hvat er best fyri landið sum heild. Høvuðstaðurin er drívmegin í føroyska samfelagnum, og hetta eiga vit at gagnnýta og stimbra heldur enn at royna at forða tí.

Høvuðstaðurin er og verður ein natúrligur miðdepil í Føroyum og í heiminum

Kappingin innanlands er ein beinleiðis forðing fyri kappingarføринum í alheimstilgongdini.

Høvuðstaðurin skal mennast til ein kraftdepil, sum skal skapa vøkstur í øllum landinum.

Høvuðstaðurin skal vera ein metropolur, ið lokkar útlendskar íløgur og vinnulív til Føroya

Samfelagið skal effektiviserast við at miðsavna heldur enn at spjaða

Um stutta tíð búgva 50% av ungum føroyingum í høvuðstaðnum

Tað er ikki longur bara ein spurningur um at menna útjaðarin í Føroyum, men um at menna Føroyar og yvirliva sum tjóð.

# Umhvørvi


RODMUND NIELSEN
Fólkaflokkurin

Menniskjað og náttúran eru treytað av hvørjum øðrum, og vit mugu gera eina sannførandi íløgu í at verja tað samanspælið. Miðvísa arbeiði fyri umhvørvinum er í dag ein stór avbjóðing, tí uttan reina luft, reint hava og vatn og óspilta náttúru er lívsgrundarlag okkara hótt á øllum økjum, og tí skal spurningurin um umhvørvi ræðfestast høkt.

Øll droyma vit um eina betri framtíð, men vit mugu ongantíð gloyma at tað er ikki nóg mikið við dreymum. Frælsi og samhugi mugu ganga lið um lið tá talan er um umhvørvi.

Umhvørvisspurningarnir mugu ræðfestast hægri í politisku skipanini, og tí kann tað ikki verða nakar ivi um: at tað skal vera góður politikkur at tryggja umhvørvi – nú og í framtíðini.

Neyðugt er at hvør einstakur tekur í egnan barm, og gerast tilvitaði um støðuna.

# Politikkur og raðfesting


HEÐIN ZACHARIASSEN
Fólkaflokkurin

Politikkur er at raðfesta og taka avgerðir. Vit eiga komandi 4 árini at raðfesta gransking av okkara vinnuum, bæði á sjógvi og landi. Á henda hátt menna okkara vinnumøguleikar í framtíðini. Hetta er sera umráðandi fyri, at vit kunnu skapa okkum møguleikar fyri framhaldandi vøkstri og menning av okkara vælferðarsamfelagi.

Grundleggjandi er, at vinnumøguleikar verða skaptir, tí skulu vit raðfesta íverksetan. Raðfesta granskingav okkara høvuðsvinnu. Raðfesta møguleikar og karmar fyri nýggjum vinnuum, og eggja fólki okkara til at gerast partur av teimum, sum skapa og byggja, heldur enn at misrøkja og bróta niður.

Vit hava brúk fyri øllum, eingin er eins. Tí er eisini so sera umráðandi, at vit øll eru um at lyfta og menna samfelagið.

Góði veljari, set tín x við Heðin Zachariasen á lista A og fá eitt umboð, sum umboðar allar Føroyar.